# Kongaminnið verður blátt í kvøld

**Havnafólk og Klaksvíkingar fara at fáa eina heldur óvanliga sjón í kvøld. Kongaminnið og Christianskirkjan verða nevnliga upplýst við bláum ljósi í kvøld. Tað er Diabetesfelagið, ið ger vart við at altjóða diabetesdagur er í dag**

DIABETES

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í samband við at dagurin í dag, 14. november, er altjóða diabetes dagur, fer Diabetesfelagið at gera vart við dagin, eins og tað verður gjørt kring allan heimin í dag.

Í Føroyum verða Kongaminnið og Chrianskirkjan upplýst við bláum ljósi í kvøld.

Tað sama verður gjørt kring allan heimin, og verða eitt nú ST-bygningurin, Eifeltornið, Dubaitornið og London Eye upplýst við bláum ljósi í kvøld.

Ætlanin var at skipa fyri einum fyrilestri í dag eisini, har Magni Mohr skuldi luttaka, men Magni Mohr er uttanlands í løtuni, og mátti tí geva avboð.

Í staðin verður hesin fyrilesturin, sum er almennur, hildin 22. november í Klaksvík, men enn er ikki endaliga gjørt av, hvar og nær hann verður hildin. Tað verður tó lýst nærri einaferð í komandi viku.

### Bjarga barnalívum

Altjóða Diabetes Felagsskapurin hevur í ár valt at seta serligt fokus á børn við diabetes. Kanningar vísa at alt ov nógv børn og ung í Vesturheiminum hava diabetes, og at talan í veruleikanum er um eina epidemi. Undir heitinum Life for a Child royna felagsskapir kring allan heim, eisini Diabetesfelagið, at savna pening saman, soleiðs at børn í triðja heiminum við diabetes kunnu fáa insulin.

Ein kendur, avstralskur doktari í diabetes, ið hevur ferðast kring allan heimin, hevur víst á allar teir ræðuleikar, ið eru kring um í triðja heiminum, har børn verða útstoytt og meir ella minni dripin av teirri orsøk, at foreldrini ikki hava ráð til insulin. Tí er stig tikið til hetta tiltakið, har felagsskapir royna at savna pening inn í ríku londunum, til tess at skaffa insulin til hesi børnini.

Kristianna Rein, forkvinna í Diabetesfelagnum, greiðir frá, at tað í Føroyum hevur gingið sera striltið at savna pening inn til hetta tiltakið.

Í Føroyum eru 25 børn og ung undir 18, ið hava diabetes, og Diabetesfelagið hevur tí sett sær sum mál at savna pening inn fyri insulin til 25 børn í triðja heiminum.

Í reiðum peningi merkir hetta at tey skulu savna millum 35- og 40.000 krónur inn árliga.

Hon heitir á fólk, ið hava hug at geva eina lítla jólagávu, ið veruliga munar nakað, um at lata Diabetesfelagnum eina lítla peninga upphædd til hetta tiltakið.

Diabetesfelagið hevur konto í øllum peningastovnunum, og allar gávur eru kærkomnar, sigur Kristianna Rein, ið er forkvinna í Diabetesfelagnum.



*Kongaminnið verður, eins og undanfarin ár, lýst upp við bláum ljósi í kvøld. Tað sama verður Christianskirkjan í Klaksvík*

# Fundaðust um Musikkskúlan

**Sunnudagin hittust tey, ið so ella so varða av Musikkskúlanum í Vági, at práta um hølisviðurskiftini**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Á fundinum sunnudagin, sum var í Ljómhúsium, varð prátað um at finna eina loysn, tí hølistrupulleikar eru. Musikkskúlin heldur í Vági til í fólkaskúlanum og aðrastaðni, m. a. heima hjá lærararum, og verður mett, at hetta er ikki munagóð loysn. Lærararnir við Musikkskúlan vilja eisini fegnir vita, hvar teirra arbeiðspláss er.

Otniel Nygaard, leiðari, legði fyri á fundinum, og so var kjak. Møtt vóru musikkskúlalærarar, kommunalpolitikarar og foreldraumboð.

Roynt hevur áður verið at finna loysn á hølistrupulleikanum, men komið er ikki á mál, og m.a. hava hús verið tøk, ið kunnu nýtast.

Á fundinum var semja um at kanna málið og at partarnir tosa saman og finna loysn á málinum.

Mett varð, at umráðandi er at finna loysn nú, tí musikkskúlin í Suðuroy er nú so væl fyri, at flestu lærarar eru fastbúgvandi í oynni, og tað hevur annars verið ein stórur trupulleiki í mong ár, at ferðalærarar eru komnir og eru so burtur aftur, tá eitt ella tvey ár eru farin.

## Løgtingið viðger nýggju psykiatrilógina í dag

TÍÐINDASKRIV

Lógin skal vera við til at tryggja, at tvingsilsnýtslan á Psykiatriska deplinum verður fyribyrgd og avmarkað í mest møguligan mun, eins og rættartrygdin hjá sálarsjúklingum verður styrkt.

Hetta verður tryggjað við lættari og smidligari kæruskipan, sjúklingaráðgevum og greiðum ásetingum viðvíkjandi eini røð av inntrivum í persónliga frælsi hjá sjúklingunum. Sum heild dagførir nýggja psykiatrilógin lógarverkið í mun til galdandi lóg, sum er frá 1938. Nýggja lógin hevur ásetingar um eina røð av viðgerðarhættum, diagnosum, fyriskipanum og tøknifrøðiligum møguleikum sum ikki vóru til tá lógin frá 1938 varð gjørd.

Tað er landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sum hevur lagt uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om anvendelse af tvang i psykiatrien" fyri Løgtingið, sigur Heilsumálaráðið í tíðindaskrivi.

# Føroyska 'brandið' sett á dagsskrá

TÍÐINDASKRIV

Jøgen Niclasen, uttanríkisráðharrin, hevur í dag havt fund við Simon Anholt, ið man vera fremsti serfrøðingur í heiminum innan tjóðarbranding.

Eitt gott umdømi hevur stóran týdning, um eitt land skal standa seg í kappingini við onnur. Simon Anholt vegleiðir londum, hvussu tey kunnu skapa sær eitt gott 'brand', og higartil hevur hann m.a. ráðgivið stjórnini í Bretlandi, Týsklandi, Svøríki og sjey øðrum londum.

Simon Anholt er í Føroyum í sambandi við, at Uttanríkisráðið er farið undir eina verkætlan, sum skal geva Føroyum ein greiðan profil úti í heimi. Fyri at verkætlanin skal eydnast, er týdningarmikið at politiska skipanin, vinnan, mentanarlívið eru við í hesum arbeiði. Tí er ein kjarnubólkur settur, sum umboðar hesar partar av samfelagnum, og hesin bólkur skal seta orð á okkara kappingarsamleika

Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharrin, sigur:

- Tað er greitt, at um vit skulu kappast á altjóða marknaðinum, mugu vit eisini vera kenda á altjóða marknaðinum. Í dag veit næstan ongin, at Føroyar eru til, og tískil mugu vit miðvíst virka fyri at seta Føroyar á heimskortið, og hetta gerst ikki við bert vanligari marknaðarføring.

- Fyrsta stigið er, at vit í Føroyum gerast tilvitað og samd um, hvørjar serligar dygdir og fyrimunir vit hava í kappingini við onnur lond. Tískil havi eg sett ein bólk, har ið leiðandi fólk innan ymsar partar av samfelagnum kunnu kjakast um hetta evni saman við Simon Anholt.

- Næsta stigið er, at niðurstøðurnar hjá hesum bólki fáa breiða undirtøku í øllum samfelagnum. Tá ið vit eru samd um, hvørjar okkara styrkir eru í mun til onnur, eru lættari at finna loysnir, har vit draga eina línu og fáa ágóðan av virkseminum hjá hvørjum øðrum.

- Triðja stigið er, at vit í okkara dagliga yrki eru tilvitað um okkara samleika í kappingar høpi. Um vit í øllum lutum leggja dent á okkara styrkir, kunnu vit í stóran mun tryggja, at umheimurin altíð fær somu fatan av Føroyum. Eydnast hetta kann sjálvt eitt lítil land sum Føroyar skapa sær eitt dygt og munagott 'brand' í altjóða samfelagnum, sigur Jørgen Niclasen at enda.